FØROYA HANDILSSKÚLI
TEKNISKI SKÚLIN

# Leiðari til Skeiðsdepilin við Marknagil

**Skeiðsdepilin við Marknagil (SDM) sóknast eftir einum framfýsnum og dugnaligum leiðara. Skeiðsdepilin, ið er undirskipaður Føroya Handilsskúla og Tekniska skúla Tórshavn, hevur til endamáls at veita viðkomandi og dygdargóð skeið til vinnulívið og almennu fyrisitingina.**

Á SDM starvast umframt leiðaran og eitt skrivstovufólk, lærarar á skúlunum og aðrir skeiðshaldarar, sum annars ikki hava sítt dagliga yrki á skúlunum.

**Nakrar av høvuðsuppgávunum hjá leiðaranum eru:**
- at hava fíggjarligu og umsitingarligu leiðsluna av deplinum
- at menna deplin
- at hava eftirlit við, at skeiðini fara fram á ein ábyrgdarfullan hátt
- at leggja skeið til rættis
- at kanna tørvin á nýggjum skeiðum

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt starv við spennandi og fjølbroyttum uppgávum
- eitt sjálvstøðugt starv
- eitt starv, sum tú í stóran mun avger innihaldi í sjálv/ur
- eitt gott og mennandi arbeiðsumhvørvi

**Vit leggja dent á, at tú:**
- hevur hóskandi útbúgving og starvsroyndir
- dugir væl at samskifta
- hevur leiðsluroyndir
- dugir væl at samskipa og raðfesta arbeiðsuppgávur
- dugir at selja skeið
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- ert kreativur

**Setanarviðurskifti:**
Starvið er fulltíðarstarv og verður lønt eftir nærri avtalu. Starvið verður sett skjótast gjørligt.

**Meiri fæst at vita** við at venda sær til Ragnar Magnussen, stjóra á Føroya Handilsskúla á Tel 317177 ella 217177.

**Umsókn:**
Umsóknir við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera, Tekniska Skúla Tórshavn í hendi, seinast 14. januar 2003.

**SKEIÐSDEPILIN VIÐ MARKNAGIL * SDM**
Marknagilsvegur 75 • Postrúm 239 • 110 Tórshavn • Tel 318813 • Fax 316621
Heimasíða www.tst.fo • www.fh.fo

víkiskylda

Veitst tú, at tú skalt taka koyrikortið um aftur, um tú fremur týðandi brot á víkiskylduna?

Harumframt fært tú treytaðan dóm at missa koyrikortið, og, dómurin er galdandi í 3 ár!

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr**. Sp/f 3070, Sp/f Loftnet, 700 Klaksvík.

**Stjórn:**
**Innkomin sum stjóri:** Rógvi Súni Poulsen, Stangaskákið 19, 700 Klaksvík.

*Skráseting Føroya tann 20. desember 2002*

*Kristin Balle*

# Tøkk fyri stuðulin



TRYGD

Fyrsta kappingarár hjá Skála Ítróttarfelag í 1. deild er farið afturum og okkara menn megnaðu at varðveita sætið í deildini

Leikararnir, venjararnir og leiðarar gjørdu sín part á vøllinum, men teir høvdu ikki megnað tað uttan tann dygga stuðul teir fingu frá sponsorum, áskoðarum og øðrum sum stuðlaðu á annan hátt.

Tí senda vit øllum tykkum eina hjartans tøkk fyri stuðulin tit vístu felagi okkara í brátt farna ári. Samstundis ynskja vit tykkum øllum eini gleðilig jól og eitt vælsignað nýggjár.

Skála Ítróttarfelag

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr.** P/F 2498, P/F Kemilux Industri, 100 Tórshavn.

**Viðtøkur broyttar:**
26.11.2002.
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Jóhan Páll Joensen, Ryggsvegur 5, 700 Klaksvík (formaður) og Jón Nolsøe Olsen, Kambsdalur, 530 Fuglafjørður.
**Innkomin í nevndina:**
Alfred Petersen, Suðuroyarvegur 8, 100 Tórshavn (formaður), Debes Petersen, Íslandsvegur 28, 100 Tórshavn, Ásbjørn Einarsson, Espigerði 2, ÌS-600 Akureyri og Baldur Guðnason, Hjarðarlundur 11, ÍS- 600 Akureyri.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av einum stjóra, nevndarformanninum ella av allari nevndini í felag.

*Skráseting Føroya tann 23. desember 2002*

*Kristin Balle*

# Kunngerð

**Frá Sørvágs kommunu**

**Um broyting av byggisamtykt v.m.**

Sambært løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um byggisamtykt og bygdaplan hevur kommunustýrið í Sørvági á fundi hin 28. november 2002 samtykt at broyta byggisamtyktina og bygdaplanin fyri Sørvágs Kommunu.

Broytingarnar eru galdandi fyri allar økispartarnar í kommununi.

Almenna byggisamtyktin saman við korti, tekningum og vegleiðing um kæru liggur frammi á kommunuskrivstovuni til almenna eftirskoðan í tíðarskeiðnum frá 2. januar til 1. februar 2003.

Mótmæli og broytingaruppskot skulu vera kommunustýrinum í hendi seinast 3 mánaðir eftir kunngerðardegnum.

Sørvágs Kommuna

Sosialurin



LØGMANSSKRIVSTOVAN

# Fulltrúi til Løgmansskrivstovuna

Fyri fulltrúa í farloyvi er starv á stjórnardeildini á Løgmansskrivstovuni leyst at seta frá 1. mars 2003 ella skjótast tilber. Starvstíðin er eftir ætlan úti 29. februar 2004.

**Uppgávur**
Fulltrúin skal m.a. samskipa verkætlanina viðvíkjandi málum, ið viðkoma pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, taka sær av ymsum bygnaðar- og fyrisitingarmálum og málum, ið hava at gera við uppgávur løgmans eftir Stýrisskipan Føroya.

Harumframt eru aðrar fyrisitingaruppgávur, eitt nú heimasíða og Norðurbryggja.

**Førleikakrøv**
Tann, ið verður settur, skal hava útbúgving frá hægri lærustovni innan samfelagsfrøði, fyrisitingarfrøði ella líknandi.

**Persónlig førleikakrøv og royndir**
Umsøkjari skal hava góð samstarvsevni, vera áhittin, miðvísur, duga at arbeiða sjálvstøðugt og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar. Umsøkjari eigur at hava arbeiðsroyndir frá almenna arbeiðsmarknaðinum. Tað er fyrimunur, at viðkomandi hevur starvast í miðfyrisitingini.

**Løn- og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag, við møguleika fyri setan sum ráðgevi.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, lívsrensli o.ø. skulu vera Løgmansskrivstovuni, Postrúm 64, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mikudagin 15. januar 2003.

Umsøkjarar eru vælkomnir at venda sær til Barbaru á Tjaldrafløtti, deildarstjóra, tlf: 35 10 10, at fáa nærri upplýsingar um starvið.

---

Løgmansskrivstovan er fyrisiting løgmans. Hon er nú skipað í tvær linjudeildir og eina umsitingareind. Høvuðsuppgávur Løgmansskrivstovurnar eru samskipan, uttanríkismál, umboðan, landsstýrisfundir, umsjón, nýskipan og fyrisiting.

# LÍVBJARGARI

Søkt verður eftir lívbjargara til svimjihylin í Gøtu at byrja skjótast gjørligt.

Arbeiðstíðin er umleið 8 tímar um vikuna.

Løn sambært avtalu.

Umsøkjarar kunnu venda sær til Sørin S. Djurhuus, tlf. 218712.

Svimjifelagið Skeggjar

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3488
**Navn:** Sp/f E-Bókhald
**Hjánøvn:** Sp/f E-Finance (Sp/f E-Bókhald), Sp/f e-bókhald.fo (Sp/f E-Bókhald) og e-finance.fo (Sp/f E-Bókhlad)
**Adressa:** 210 Sandur
**Kommuna:** Sands Kommuna
**Stovningardato:** 17.12.2002
**Viðtøkudato:** 17.12.2002
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnari:** Eyðstein Jensen, Kongsgil 19, 100 Tórshavn.
**Stjórn:** Eyðstein Jensen, Kongsgil 19, 100 Tórshavn.
**Tekningarreglur:** Felagið verður bundið við undirskrift av stjóranum.
**Grannskoðari:** Óli Regin Hansen, skrásettur grannskoðari, Tróndargøta 39, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 17.12.2002 - 31.12.2003
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka virksemi innan bókhald, ráðgeving, keyp og søla (trading) umframt aðra vinnu, sum stendur í samband við nevnda rakstur.

*Skráseting Føroya tann 23. desember 2002*

*Kristin Balle*

SKIPASMIÐJAN



Filtur
Brennoljufiltur
Sm. oljufiltur
Luftfiltur
Vatnfiltur

P/F Tórshavnar Skipasmiðja
Tel: 31 11 55 · Fax: 31 11 25
P/F Skipasmiðjan á Skála
Tel: 44 11 55 · Fax: 44 11 25
24 tíma Vakt
tel: 21 11 55

www.faroeyard.fo · E-mail: sale@faroeyard.fo

*21. desember var tíverri skeiv lýsing hjá Niels L. Arge komin í Sosialin.*

*Vit biðja um umbering!*

Sosialurin

Bilar Lýsingar Tíðindi Viðmerkingar Ítróttur Nøvn Skráir

*SP/F Trolvirkið Bergið ynskir øllum viðskiftafólkum sínum og øllum annars eitt eydnuberandi nýtt ár, við tøkk fyri tað brátt farna.*

TROLVIRKIÐ BERGIÐ

*850 Hvalba · Tlf. 375350 · Fax 375650*
*T-postur: bergid@post.olivant.fo*